GJALDSTOVAN

|  |  |
|---|---|
| Argir: | des. 2020 |
| FGj. j.nr.:<br>(at tilskila í svari) | |
| Tygara j.nr.: | |

ALMENNIR STOVNAR

**Kunning av stovnsleiðarum um tíðarfreistir o.tíl.**

Góði stovnsleiðari,

Nú ið 2020 skjótt er farið aftur um bak, ynskir gjaldstovan at kunna teg um, hvussu vit kunna um tíðarfreistir o.a. í sambandi við ársskiftið.

Brúktir verða 3 miðlar í sambandi við kunning: teldubrøv til tín, tíðindir á BSL portalinum og á gjaldstovan.fo - umframt at ymsi kunningarskriv o.a. eru á gjaldstovan.fo. Sí leinkini "ársroknskapurin 2020" og "roknskapargóðkenning", sum tú eigur at kunna teg við.

Undir leinkinum "ársroknskapurin 2020" sært tú leinkið "Listi yvir FSL-mánaðarkoyringar Jan. – Des. 2021", har kunnað er um, nær ið tíðarskeið verða latin aftur og roknskaparútskriftir í telduposti sendar út. Sambært yvirlitinum er 24. februar 2021 síðsti dagur, ið stovnarnir kunnu skráseta á fíggjarárið 2020 – síðsta lønarkoyring viðvíkjandi fíggjarárinum 2020 verður helst nakrar dagar undan hesum.

Gjaldstovan fer so hvørt at kunna um, at tíðarskeið verða latin aftur – herímillum eisini um, at síðsta freist at bóka á fíggjarárið 2020 nærkast.

g.v.

Gjaldstovan